# Listaligt arbeiði á Føroyamálsdeildini

Námsskipan

2020

# Innihald


Lestur í listaligum arbeiði á Føroyamálsdeildini ..... 4

Inngangur ..... 4

Útbúgvingin ..... 4

Námsskipan fyri Diplom í listaligum arbeiði ..... 5

Námið ..... 5

Lýsing av útbúgvingini ..... 5

Upptøkukrøv ..... 8

Stakgreinalestur ..... 8

Bygnaður – yvirlit ..... 8

Skeiðslýsingar heystið 2019 ..... 9

Egið arbeiði I – Ritlist ..... 9

Verkstova I – Ritlist ..... 10

Egið arbeiði I - Tónlist ..... 11

Verkstova I – Tónlist ..... 12

Fagurfrøði ..... 13

Egið arbeiði II – Ritlist ..... 15

Verkstova II – Ritlist ..... 16

Egið arbeiði II - Tónlist ..... 17

Verkstova II – Tónlist ..... 18

Reglur fyri námið ..... 19

Lestrarlistar ..... 19

Endalig verkætlan ..... 19

Ritgerð ..... 19

Innlating av endaligari verkætlan og ritgerð og møguligar seinkingar ..... 19

Allýsing av lestrarevnum ..... 20

Góðskrivingar av lestri uttanlands og á øðrum deildum á Fróðskaparsetrinum ..... 20

Lokin skeið eftir eldri námsskipanum ..... 20

ECTS (European Credit Transfer System) ..... 20

Mentorskipan á Ritlistaleiðini ..... 21

Skeið á útbúgvingini í Føroyskum ... 21
Serskeið á Tónlistaleiðini ... 21
Sjálvlestrarlistar ... 21
Innskriving ... 21
At skifta leið ... 21
Próvtøkur ... 22
Almenn próvtøkukrøv ... 22
Lestrarlistar ... 22
Verk, tekstir og blaðsíður ... 22
Heimauppgávur ... 22
Bólka- og einstaklingsuppgávur ... 23
Rættlæti ... 23
Egið avrik ... 23
Próvtøkuhættir ... 24
Munnlig og skrivlig próvtøka ... 24
Heimauppgávur ... 24
Avriksmappa ... 24
Próvreglur ... 25
Próvtøka ... 25
Endurpróvtøka ... 25
Sjúka ... 25
Próvtøkuhald ... 26
Møting ... 26
Hjálparamboð ... 26
Sjúka við próvtøkuhaldið ... 26
Um at fara frá próvtøku ... 26
Próvtøkutíðin lokin ... 27
Próvtøkuúrslit ... 27
Viðvíkjandi kærum ... 27
Reglur um teldunýtslu til próvtøku ... 27

# Lestur í listaligum arbeiði á Føroyamálsdeildini

## Inngangur

Í hesum hefti er námsskipanin fyri lesturin í listaligum arbeiði á Føroyamálsdeildini. Námsskipanin er ásetingarnar fyri innihaldið í útbúgvingini og reglurnar fyri, hvussu útbúgvingin verður útint.

Námsskipanin er grundað á løgtingslóg og kunngerð um Fróðskaparsetur Føroya.

Námsskipanin sigur, hvørji krøv verða sett studentinum, og hvørji rættindi og skyldur hann/hon hevur sum studentur á Føroyamálsdeildini.

Námsskipanin er galdandi ta tíð, lesturin er ásettur at vera. Um studentur vegna longda lestrartíð kemur í ta støðu, at nýggj námsskipan kemur í gildi, áðrenn studenturin hevur staðið allar prógvtøkurnar, má hann gera avtalu við fyrisitingina um, hvussu lesturin verður fullførdur.

## Útbúgvingin

Diplomútbúgvingin í listaligum arbeiði leggur høvuðsdentin á skapandi arbeiði innan ritlist og tónlist. Lesturin er skipaður við tí fyri eyga, at studenturin bæði lærir viðkomandi arbeiðshættir innan sína listagrein og mennir evnini at arbeiða sjálvstøðugt við egnum verkum. Harumframt nemur studenturin sær ástøðiligan kunnleika, ið letur upp nýggj sjónarhorn at hugsa greinandi um list. Umframt útbúgvingina í listaligum arbeiði veitir Føroyamálsdeildin eisini BA-, MA- og ph.d.-útbúgvingar í føroyskum máli og bókmentum. Saman við hesum útbúgvingum er útbúgvingin í listaligum arbeiði grundarlagið undir einum umhvørvi, har bæði granskandi og skapandi arbeiðshættir verða nýttir til at viðgera mál, mentan og list.

At taka Diplom í listaligum arbeiði er fulltíðarstarv, og ein treyt fyri at sleppa til prógvtøku er, at studenturin regluliga møtir til undirvísing. Studentarnir fyrireika seg til tímarnar og eiga harumframt at arbeiða sjálvstøðugt aftur at tí, sum verður viðgjørt í undirvísingini. Undirvísingarformurin kann vera: fyrilestrar, meistaralæra, studentaframløgur, venjingar og uppgávur, orðaskifti í bólkum og flokki, seminar og leiðbeining. Tað er sjálvsagt, at studentarnir fylgja við í mentanarlívinum, t.d. bóka- og tónleikaútgávum og ummælum. Somuleiðis at teir fara til konsertir, upplestrar, leiksýningar og onnur listarlig og mentanarlig tiltøk.

Umframt fulltíðarlestur ber eisini til at taka ástøðiligu skeiðini sum stakgreinalestur.

Undirvísingin er grundað á granskingarvirksemið hjá lærarunum, sum eru granskarar á Føroyamálsdeildini, og listaliga virksemið hjá lærarunum, ið eru yrkislistafólk við avrikum og royndum, sum geva førleika at undirvísa í listaligum arbeiði á universitetsstigi. Útbúgvingin er einasta útbúgving av sínum slag á universitetsstigi í Føroyum. Tað áleggur tí deildini at bjóða dygdargóða undirvísing, ið kann gagna listaumhvørvinum og føroyska samfelagnum sum heild.

# Námsskipan fyri Diplom í listaligum arbeiði

## Námið

Útbúgvingin tekur tvey ár (120 ECTS) og er býtt sundur í tvær listaligar leiðir, ritlist og tónlist. Ein partur av námsevnunum er felags evni, og ein partur er treytaður av listaligu leiðini, sum studenturin velur. Felags fyri báðar leiðirnar er, at tveir triðingar av námsevnunum eru verkligir og ein triðingur ástøðiligur. Endamálið við hesum býtinum er, at studenturin bæði ognar sær verkligan førleika til sjálvstøðugt listaligt arbeiði og fær grundleggjandi ástøðiliga vitan til at hugsa greinandi um list og egna skapanargongd. Tey, ið fáast við bæði ritlist og tónlist, hava møguleika at fylgja undirvísingini á báðum leiðum. Tó kunnu tey einans fáa útskrivað prógv í leiðini, sum tey eru innskrivaði til.

## Lýsing av útbúgvingini

*Diplomútbúgving í listaligum arbeiði*

| | |
|---|---|
| SLAG AV ÚTBÚGVING OG ÁRAMÁL | Tvey ára diplomnám í listaligum arbeiði – 120 ECTS |
| ÚTBÚGVINGARSTOVNUR/-AR | Fróðskaparsetur Føroya<br>*University of the Faroe Islands* |
| STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR | Mentamálaráðið (MMR) |
| TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL | Námsskipan fyri útbúgving í listaligum arbeiði frá 2016. |
| STIG | Dip. "1st Cycle" sambært EQF – LLL og QF – EHEA. |

| A | ENDAMÁL |
|---|---|
| | Studenturin fær grundleggjandi ástøðiliga vitan um list og ognar sær verkligan førleika til listaligt arbeiði. |

| B | EYÐKENNI | |
|---|---|---|
| 1 | GREIN(AR) / EVNISØKI | Evnisøkið er skapandi list og listaligt arbeiði. Námsevnini eru tveir triðingar verklig og ein triðing ástøðilig. Ein partur av námsevnunum er felags evni, og ein partur er treytaður av listaligu leiðini, sum studenturin velur. Leiðirnar eru tvær: tónlist og ritlist. Aðrar leiðir kunnu leggjast afturat, um undirtøka og grundarlag er |

| | | |
|---|---|---|
| | | fyri tí. Verkliga verður dentur lagdur á arbeiði í verkstovum bæði innan ta listagrein, sum studenturin hevur valt, og millum listagreinir (80 ECTS). Ástøðiliga verður dentur lagdur á vitan um list í bókmentafrøðiligum, tónleikafrøðiligum og fagurfrøðiligum høpi (40 ECTS). |
| 2 | ALMENNUR / SERLIGUR DENTUR | Áherðsla verður løgd á grundleggjandi vitan um list og listaligt arbeiði bæði ástøðiliga og verkliga. Frá byrjan verður arbeitt stigvíst við at menna førleikarnar at brúka ástøðiliga vitan í egnum, sjálvstøðugum listaligum arbeiði. |
| 3 | KÓS | Útbúgvingin er granskingargrundað og miðar móti sjálvstøðugum listaligum arbeiði innan einstakar listagreinir og tvørtur um mørk millum listagreinir. |
| 4 | SERLIG EYÐKENNI | Tað eyðkennir útbúgvingina, at ástøði og verkligar royndir hanga saman, og at einstøku listaligu leiðirnar byggja á felags støði. Í verkliga partinum verður lagt upp til verkætlanir, sum ganga tvørtur um hevdbundin mørk millum listagreinir. Harumframt verður mælt studentunum til, men ikki kravt av teimum, at teir eftir útbúgvingina nýta møguleikan at halda fram á øðrum útbúgvingarstovni. Hvør einstakur studentur ger sær frá byrjan eina avriksmappu (portfolio) til skjalfestingar og nýtslu í sambandi við umsóknir og upptøkuroyndir. |

| **C** | **STARVSMØGULEIKAR OG FRAMHALDSÚTBÚGVING** | |
|---|---|---|
| 1 | STARVSMØGULEIKAR | Prógvið gevur grundarlag fyri sjálvstøðugum listaligum arbeiði og harumframt starvsmøguleikar í miðlum, vinnuvirkjum og almennum stovnum. |
| 2 | FRAMHALDSÚTBÚGVING | Eftir lokna útbúgving ber til at søkja um upptøku á øðrum útbúgvingarstovni at fáa BA-prógv. Neyðugt er at kanna upptøkutreytir í hvørjum føri, tí útbúgvingarstovnar hava ymiskar reglur. |

| **D** | **ÚTBÚGVINGARHÁTTUR** | |
|---|---|---|
| 1 | ARBEIÐSLAG Í SAMBANDI VIÐ LÆRU- OG UNDIRVÍSING | Undirvísingarhættirnir í ástøðiliga partinum eru floksundirvísing við fyrilestrum, lærara- og studentaframløgum, skrivligum uppgávum og bólkarbeiði. Í verkliga partinum eru undirvísingarhættirnir verkstovur og meistaralæra við venjingum, greiningum og sínámillum kritikki av egnum avrikum. Harumframt verður arbeitt við verkætlanum antin einsæris ella í felag. |
| 2 | PRÓVTØKUHÆTTIR | Próvtøkurnar eru munnligar og skrivligar, ávegis listalig avrik, heimauppgávur við fríum ella bundnum evni ella samanseting av |

| | | |
|---|---|---|
| | | skrivligari ella munnligari próvtøku og heimauppgávu. Endað verður við listaligari verkætlan og ritgerð. |

| E | ÚTBÚGVINGARFØRLEIKAR |
|---|---|
| 1 | ALMENNIR FØRLEIKAR: |
| | • Nýskapan: at finna uppá, hugsa skapandi og seta í verk<br>• Nýta ástøðiliga vitan í verki<br>• Sjálvstøðugt arbeiðslag<br>• Førleiki at arbeiða tvørtur um hevdbundin virkisøki<br>• Førleiki sjálvstøðugt at seta sær mál, sjálvleiðsla<br>• Duga at arbeiða við og gera eina avriksmappu til ávíst endamál |
| 2 | NÁMSTREYTAÐIR FØRLEIKAR: |
| | • Førleiki at greiða frá list og listaligum arbeiði<br>• Duga at lýsa og greina listalig avrik<br>• Skilja og kunna greiða frá ástøðiligum hugsanum um list<br>• Duga grundleggjandi arbeiðshættir innan ávísa listagrein<br>• Evni at meta um egin listalig avrik<br>• Duga at nýta ástøði um list í listaligum verkætlanum<br>• Duga at arbeiða tvørtur um mørk millum listagreinir<br>• Duga at finna upp á verkætlanir og loysnir í listaligum arbeiði<br>• Innlit í arbeiði og endamál við avriksmappum sum part av eini útbúgving og evni at meta um støði í slíkum avriksmappum |

| F | FULLFÍGGJAÐUR LISTI VIÐ LÆRUÚRTØKUNI FRÁ ÚTBÚGVINGINI |
|---|---|
| | Eftir lokna útbúgving skal studenturin vera før/ur fyri at:<br><br>• greina ástøðiligar hugsanir um list<br>• brúka ástøðiliga vitan um list og listaligt arbeiði í verki<br>• loysa uppgávur, sum krevja verklig listalig evni og innlit<br>• finna uppá og seta í verk listaligt arbeiði<br>• arbeiða sjálvstøðugt við egnum verkætlanum<br>• samskifta greitt um listaligt arbeiði<br>• arbeiða tvørtur um mørk millum listagreinir<br>• taka ímóti kritikki og brúka kritikk í egnum verkætlanum<br>• brúka egin avrik í framhaldandi persónligari og listaligari menning og útbúgving |

## Upptøkukrøv

Til at verða upptikin á Diplom í listaligum arbeiði krevst bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsprógv. Við umsóknini skulu vera skjalprógv fyri, at studenturin hevur kravdu fortreytirnar. Umsøkjarar, ið søkja á øðrum grundarlagi, mugu prógva, at teir lúka samsvarandi krøv. Er ivi um førleikarnar, kann skipast fyri upptøkuroynd.

Umframt hesar treytir er upptøka eisini treytað av, at egið arbeiði verður latið inn, sum staðfestir nøktandi listaligan førleika innan annaðhvørt ritlist ella tónlist. Verður søkt um upptøku til ritlist, skulu fimm síður av egnum skrivligum avriki latast inn. Verður søkt um upptøku til tónlist, skulu nótabløð av egnum tónleikaverki og/ella upptøkur á í mesta lagi fimm minuttir latast inn. Umsøkjarar skulu harumframt lata inn eina síðu, sum í stuttum lýsir teirra listaliga profil. Fyri hvørja leið metir ein upptøkunevnd við trimum limum um innkomna tilfarið.

Tey, ið verða tikin upp, verða tikin upp til aðra av leiðunum og fáa prógv í antin Ritlist ella Tónlist, men kunnu fylgja undirvísing á báðum leiðum.

## Stakgreinalestur

Stakgreinalesandi eru studentar, sum fylgja undirvísing og fara til próvs í einstøkum av ástøðiligu skeiðunum á útbúgvingini, uttan at vera innskrivaðir til fullan lestur. Verkligu skeiðini verða vanliga ikki boðin út til stakgreinalestur. Stakgreinalesandi søkja um upptøku til hvørt ástøðiligt skeið sær og skulu lúka somu krøv til upptøku sum aðrir studentar. Stakgreinalesandi kunnu verða tikin upp, um pláss er á skeiðinum. Gjald er fyri stakgreinalestur. Skeiðsgjaldið er fyri undirvísing, vegleiðing, próvtøku og umsiting. Søkt verður um upptøku til stakgreinalestur við serstøkum umsóknarblaði. Fulltíðarlesandi á Setrinum kunnu taka stakskeið á øðrum útbúgvingum á Setrinum uttan at gjalda.

## Bygnaður – yvirlit

<table>
<tr><th>1. hálva</th><th>2. hálva</th><th>3. hálva</th><th>4. hálva</th></tr>
<tr><td>Verkstova 1<br>10 ECTS</td><td>Verkstova 2<br>10 ECTS</td><td>Verkstova 3<br>10 ECTS</td><td rowspan="2">Verkætlan<br>20 ECTS</td></tr>
<tr><td>Egið arbeiði 1<br>10 ECTS</td><td>Egið arbeiði 2<br>10 ECTS</td><td>Egið arbeiði 3<br>10ECTS</td></tr>
<tr><td>Ástøðiligt skeið<br>Fagurfrøði<br>10 ECTS</td><td>Ástøðiligt skeið<br>(skiftandi evni)<br>10 ECTS</td><td>Ástøðiligt skeið<br>(skiftandi evni)<br>10 ECTS</td><td>Ritgerð<br>10 ECTS</td></tr>
</table>

## Egið arbeiði I – Ritlist

**Skeiðsnummar** 1630.19 **ECTS** 10

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Egið arbeiði I – Ritlist |
| **Endamál** | Endamálið við skeiðinum er at menna sjálvstøðugt skrivingarlag og evnini at varnast, hvussu avgerðirnar, ein tekur sum høvundur ella yrkjari, treyta tekstirnar hjá einum listaliga. |
| **Innihald** | Arbeitt verður við egnum tekstum, sum studentarnir skriva í sambandi við skeiðið. Høvuðsdenturin verður lagdur á at neyvlesa og greina tekstirnar við atliti at serligum eyðkennum í skrivikynstri og samsvari millum listaligar ætlanir og úrslit. |
| **Læru- og undirvísingarhættir** | Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum meistaralæra (masterclass), har egna arbeiðið hjá studentunum verður viðgjørt og ment gjøgnum greinandi samrøður í bólkum og í einsæris samrøðum. |
| **Próvtøkuháttur** | Samansett próvtøka. Studenturin letur inn egnan tekst á uml. 5 síður tvær vikur áðrenn munnligu próvtøkuna. |
| **Læruúrtøka** | Tá skeiðið er lokið, skal studenturin vera førur fyri at<br>- greiða frá egnari arbeiðsgongd<br>- greina egnan skrivihátt við atliti at stíli og tekstslagi<br>- meta um listaligar styrkir og veikleikar í egnum tekstum |
| **Fortreytir** | Treyt fyri luttøku er at studenturin er innskrivað/ur til diplomútbúgvingina í listaligum arbeiði. |
| **Lestrarlisti** | Viðkomandi tilfar verður útflýggjað við lestrarbyrjan. Til próvtøkuna gevur studenturin upp tað tilfar, sum er lisið á skeiðinum umframt egin avrik. Tilfarið skal í vavi samsvara við tær ásetingar, sum eru fyri skeið á BA-stigi á Føroyamálsdeildini |
| **Próvdøming** | Innanhýsis próvdøming. |
| **Próvtalastigi** | Staðið/ikki staðið. |
| **Stig** | BA |
| **Undirvísari** | Rói Patursson |
| **Ábyrgd** | Jens Dam Ziska |

## Verkstova I – Ritlist

**Skeiðsnummar** 1625.19 **ECTS** 10

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Verkstova I – Ritlist |
| **Endamál** | Studentarnir ogna sær grundleggjandi vitan um ástøðiligar hugsanir og arbeiðshættir innan ritlist og læra at brúka vitanina verkliga. |
| **Innihald** | Skeiðið verður lagt til rættis, so innihaldið í mest møguligan mun samsvarar við áhugamálini og tørvin hjá studentunum. Undirvíst verður eitt nú í frásagnarhættum, neyvlesing, narratologi, týðing og øðrum evnum, sum eru viðkomandi fyri skaldskapargreinina/-slagið, ið studentarnir arbeiða við. Dentur verður bæði lagdur á at greina viðkomandi ástøðiligar hugsanir um skriving og verkliga menning í skriving. |
| **Læru- og undirvísingarhættir** | Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum verkstovuundirvísing við venjingum, kjaki, fyrilestrum og framløgum. |
| **Próvtøkuháttur** | Samansett próvtøka. Studenturin fær útflýggjað uppgávu, sum skal svarast skrivliga og síðani verða grundarlag undir munnligari próvtøku. |
| **Læruúrtøka** | Tá skeiðið er lokið, skal studenturin vera førur fyri at<br>- greiða frá grundleggjandi ástøðiligum hugsanum og arbeiðshættum innan ritlist<br>- greinandi viðgera hesi<br>- sýna dømi um hesi í verki og meta um tey |
| **Fortreytir** | Treyt fyri luttøku er, at studenturin er innskrivað/ur til diplomútbúgvingina í listaligum arbeiði. |
| **Lestrarlisti** | Viðkomandi tilfar verður útflýggjað við lestrarbyrjan. Til próvtøkuna ger studenturin ein lestrarlista á umleið 500 síður burtur úr tilfarinum, sum er lisið í sambandi við skeiðið og egnum tekstum. |
| **Próvdøming** | Innanhýsis próvdøming. |
| **Próvtalastigi** | Staðið/ikki staðið. |
| **Stig** | BA |
| **Undirvísarar** | Skiftandi undirvísarar |
| **Ábyrgd** | Jens Dam Ziska |

# Egið arbeiði I - Tónlist

**Skeiðsnummar** 1640.19 **ECTS** 10

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Egið arbeiði I – Tónlist |
| **Endamál** | Skeiðið hevur til endamáls at menna sjálvstøðugt tónasmíð og evnini at varnast, hvussu avgerðirnar, ein tekur sum tónaskald, treyta listaligu eginleikarnar hjá verkunum, sum spyrjast burturúr. |
| **Innihald** | Arbeitt verður við egnum verkum, sum studentarnir tónseta í sambandi við skeiðið. Høvuðsdenturin verður lagdur á at neyvlurta og greina verkini við atliti at, hvussu kompositión og útseting samsvara við listaligu ætlanina hjá studentinum. |
| **Læru- og undirvísingarhættir** | Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum meistaralæra (masterclass), har egna arbeiðið hjá studentunum verður viðgjørt og ment gjøgnum greinandi samrøður í bólkum og einsæris samrøðum. |
| **Próvtøkuháttur** | Samansett próvtøka. Studenturin letur inn upptøku á uml. 5 min. við egnum tónleiki tvær vikur áðrenn munnligu próvtøkuna. |
| **Læruúrtøka** | Tá skeiðið er lokið, skal studenturin vera førur fyri at<br>- greiða frá egnari arbeiðsgongd<br>- greina egið tónasmíð við atliti at stíli og tónleikagrein<br>- meta um listaligar styrkir og veikleikar í egnum avrikum |
| **Fortreytir** | Treyt fyri luttøku er, at studenturin er innskrivað/ur til diplomútbúgvingina í listaligum arbeiði. |
| **Lestrarlisti** | Viðkomandi tilfar verður útflýggjað við lestrarbyrjan. Til próvtøkuna gevur studenturin upp tað tilfar, sum er lisið/lurtað eftir á skeiðinum íroknað egin avrik. Tilfarið skal í vavi samsvara við tær ásetingar, sum eru fyri skeið á BA-stigi á Føroyamálsdeildini. |
| **Próvdøming** | Innanhýsis próvdøming. |
| **Próvtalastigi** | Staðið/ikki staðið. |
| **Stig** | BA |
| **Undirvísari** | Sunleif Rasmussen og gestalærarar |
| **Ábyrgd** | Sunleif Rasmussen |

# Verkstova I – Tónlist

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Skeiðsnummar** | 1635.19 | **ECTS** | 10 |

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Verkstova I – Tónlist |
| **Endamál** | Studentarnir ogna sær grundleggjandi vitan um ástøðiligar hugsanir og arbeiðshættir innan tónasmíð/sangskriving og læra at brúka vitanina verkliga. |
| **Innihald** | Skeiðið verður lagt til rættis, so innihaldið í mest møguligan mun samsvarar við áhugamálini og tørvin hjá studentunum. Undirvíst verður eitt nú í nótalæru, harmoni, ljóðtøkni og øðrum evnum, sum eru viðkomandi fyri tónleikagreinirnar, ið studentarnir arbeiða innan. Dentur verður bæði lagdur á at greina viðkomandi tónleikaástøði og at meistra tey í verki. |
| **Læru- og undirvísingarhættir** | Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum verkstovuundirvísing við venjingum, kjaki, fyrilestrum og framløgum. |
| **Próvtøkuháttur** | Samansett próvtøka. Studenturin fær útflýggjað uppgávu, sum skal svarast og latast inn og síðani verða grundarlag undir munnligari próvtøku. |
| **Læruúrtøka** | Tá skeiðið er lokið, skal studenturin vera førur fyri at<br>- greiða frá grundleggjandi ástøðiligum hugsanum og arbeiðshættum innan tónasmíð/sangskriving<br>- greinandi viðgera hesi<br>- sýna dømi um hesi í verki og meta um tey |
| **Fortreytir** | Treyt fyri luttøku er, at studenturin er innskrivað/ur til diplomútbúgvingina í listaligum arbeiði. |
| **Lestrarlisti** | Viðkomandi tilfar verður útflýggjað við lestrarbyrjan. Til próvtøkuna gevur studenturin upp tað tilfar, sum er viðgjørt á skeiðinum. Tilfarið skal í vavi samsvara við tær ásetingar, sum eru fyri skeið á BA-stigi á Føroyamálsdeildini. |
| **Próvdøming** | Innanhýsis próvdøming. |
| **Próvtalastigi** | Staðið/ikki staðið. |
| **Stig** | BA |
| **Undirvísari** | Sunleif Rasmussen og gestalærarar |
| **Ábyrgd** | Sunleif Rasmussen |

# Fagurfrøði

**Skeiðsnummar** 1620.19 **ECTS** 10

| **Heiti** | Fagurfrøði |
|---|---|
| **Endamál** | Skeiðið hevur til endamáls at geva innlit í fagurfrøði sum fak og sum tól at hugsa greinandi um list. Studenturin ognar sær kunnleika um lyklaástøði og hugtøk innan fagurfrøði og mennir førleikan at viðgera heimspekiligar spurningar um list gjøgnum kjak og kritiska tankagongd. |
| **Innihald** | Lisið verður eitt úrval av upprunatekstum, sum hava havt avgerandi týdning í fagurfrøðisøguni. Vit viðgera m.a. tær týdningarmestu royndirnar at nágreina, hvat list er, og umrøða spurningin, hvørt tað yvirhøvur ber til at allýsa list. Er nakar felagsnevnari, sum eyðkennir alla list, ella hava ymsu listagreinarnar hvør sína serstøku kjarnu, sum togar tær í hvør sína ætt? Eisini spyrja vit, hvat listaligt virði er, og um tað ber til at hava sakligar grundir til at siga, at eitt listaverk er betri enn eitt annað. Hava summi fólk ein serliga góðan fagurfrøðiligan sans, sum ger tey meira før enn onnur at skilja millum góða og ringa list, ella er fagurfrøðiligur smakur einans eitt tekin um, hvørja stætt ein hoyrir til? At enda viðgera vit eisini sambandið millum listafólk og áskoðara/áhoyrara/lesara. Er tað altíð listafólkið, sum ger av, hvønn týdning eitt listaverk hevur, ella hevur almenningurin eins nógv ræði yvir, hvat verkið merkir, og hvussu tað skal tulkast? |
| **Læru- og undirvísingarhættir** | Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum floksundirvísing við lærara- og næmingaframløgum umframt kjakfundir um útvaldar tekstir. |
| **Próvtøkuháttur** | Bundin heimauppgáva á uml. 10 síður. Studenturin fær 14 dagar at skriva uppgávuna í. |
| **Læruúrtøka** | Tá skeiðið er lokið, skal studenturin vera førur fyri at<br>- greiða frá grundleggjandi hugtøkum og rákum úr fagurfrøðisøguni<br>- greina og eyðmerkja styrkir og veikleikar við týðandi listaástøðum<br>- gera egnar niðurstøður um hesi ástøði<br>- nýta fagurfrøði sum tól at hugsa um listaverk og listagreinar úr einum heimspekiligum sjónarhorni |
| **Fortreytir** | Miðnámsprógv ella samsvarandi. |

| | |
|---|---|
| **Lestrarlisti** | Lestrarlistin er um 500 síður til longdar og er settur saman av tekstum úr hesum verkum.<br><br>Noël Carroll, *Philosophy of Art: A Contemporary Introduction*, Routledge, 1999.<br><br>Sara Danius, Cecilia Sjöholm & Sven-Olov Wallenstein, *Aisthesis. Estetikens Historia, Del 1,* Thales, 2012.<br><br>Matthew Kieran, *Revealing Art*, Routledge, 2005.<br><br>Alex Neill & Aaron Ridley, *The Philosophy of Art: Readings Ancient and Modern*, McGraw-Hill, 1995. |
| **Próvdøming** | Uttanhýsis próvdøming. |
| **Próvtalastigi** | 7-talsstigin |
| **Stig** | BA |
| **Undirvísari** | Jens Dam Ziska |
| **Ábyrgd** | Jens Dam Ziska |

# Egið arbeiði II – Ritlist

| **Skeiðsnummar** | 1643.20 | **ECTS** | 10 |
|---|---|---|---|

| **Heiti** | Egið arbeiði II – Ritlist |
|---|---|
| **Endamál** | Studentarnir læra at arbeiða kritiskt við ritlist og menna egið skrivingarlag. |
| **Innihald** | Skeiðið er framhald av Egið arbeiðið I - Ritlist. Eins og í fyrra skeiðinum verður arbeitt við egnum tekstum, sum studentarnir skriva í sambandi við skeiðið. Høvuðsdenturin verður lagdur á at neyvlesa, greina og kritiskt viðgera egnan tekst við atliti at serligum eyðkennum í skrivikynstri og samsvari millum listaligar ætlanir og úrslit. Eisini verða viðkomandi ástøðiligir tekstir lisnir, ið seta tað at skriva í størri listalig, heimspekilig og samfelagslig høpi. Tekstir, sum studentarnir skriva, verða so hvørt, teir verða latnir inn, savnaðir í eina avriksmappu. |
| **Læru- og undirvísingarhættir** | Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum meistaralæra (masterclass), har egna arbeiðið hjá studentunum verður viðgjørt og ment gjøgnum bólkarbeiði og samrøður við mentorar. Mentorar eru royndir rithøvundar ella yrkjarar, sum studentarnir velja sær, áðrenn hálvan byrjar, og hava samrøður við tríggjar ferðir í hálvuni. |
| **Próvtøkuháttur** | Avriksmappa verður latin inn við skeiðsenda. |
| **Læruúrtøka** | Tá skeiðið er lokið, skal studenturin vera førur fyri at<br>- greiða frá egnari arbeiðsgongd<br>- greina egnan skrivihátt við atliti at tekstslagi og móttakara<br>- meta um listaligar styrkir og veikleikar í egnum tekstum<br>- sýna dømi um menning av egnum arbeiði í ritlist (framleiða avriksmappu). |
| **Fortreytir** | Treyt fyri luttøku er, at studenturin er innskrivað/ur til diplomútbúgvingina í listaligum arbeiði. |
| **Lestrarlisti** | Viðkomandi tilfar verður útflýggjað við lestrarbyrjan. Til próvtøkuna gevur studenturin upp tað tilfar, sum er lisið á skeiðinum umframt egið tilfar. Tilfarið skal í vavi samsvara við tær ásetingar, sum eru fyri skeið á BA-stigi á Føroyamálsdeildini. |
| **Próvdøming** | Uttanhýsis próvdøming. |
| **Próvtalastigi** | 7-talsstigin |
| **Stig** | BA |
| **Undirvísari** | Rói Patursson |
| **Ábyrgd** | Inger Smærup Sørensen |

# Verkstova II – Ritlist

**Skeiðsnummar** 1642.20 **ECTS** 10

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Verkstova II - Ritlist |
| **Endamál** | Studentarnir fáa innlit í ástøðiligar hugsanir og arbeiðshættir í týðing og skapandi skriving og læra at brúka hesa vitan í egnum ritlistaligum arbeiði. |
| **Innihald** | Skeiðið er helvt um helvt um týðing og skapandi skriving. Undirvíst verður í týðing bæði ástøðiliga og verkliga. Viðkomandi tættir í týðingarfrøði verða viðgjørdir, og studentarnir fáa høvi og leiðbeining í at týða útvaldar tekstir. Innan skapandi skriving verður serliga undirvíst í at skriva prosa. Hugt verður millum annað eftir, hvussu ein brúkar ymisk sløg av íblástrarkeldum í skrivitilgongdini, og hvussu tað tilvitaða og tað ótilvitaða eru partar av skrivingini. Arbeitt verður bæði við at læra av fyrimyndum og við at finna sína egnu rødd sum rithøvundur. |
| **Læru- og undirvísingarhættir** | Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum verkstovuundirvísing við venjingum, kjaki, fyrilestrum og framløgum. |
| **Próvtøkuháttur** | Samansett próvtøka. Munnlig próvtøka við støði í avriksmappu, ið verður latin inn tvær vikur áðrenn próvtøkuna. |
| **Læruúrtøka** | Tá skeiðið er lokið, skal studenturin vera førur fyri at<br>- greiða frá ástøðiligum hugsanum og arbeiðshættum í týðing og skapandi skriving<br>- greinandi og kritiskt viðgera hesi<br>- sýna dømi um menning av egnum arbeiðshættum í ritlist (framleiða avriksmappu). |
| **Fortreytir** | Treyt fyri luttøku er, at studenturin er innskrivað/ur til diplomútbúgvingina í listaligum arbeiði. |
| **Lestrarlisti** | Viðkomandi tilfar verður útflýggjað við lestrarbyrjan. Til próvtøkuna gevur studenturin upp tað tilfar, sum er viðgjørt á skeiðinum. Tilfarið skal í vavi samsvara við tær ásetingar, sum eru fyri skeið á BA-stigi á Føroyamálsdeildini. |
| **Próvdøming** | Uttanhýsis próvdøming. |
| **Próvtalastigi** | 7-talsstigin. |
| **Stig** | BA |
| **Undirvísarar** | Turið Sigurðardóttir og Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð |
| **Ábyrgd** | Inger Smærup Sørensen |

# Egið arbeiði II - Tónlist

**Skeiðsnummar** | 1646.20 | **ECTS** | 10

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Egið arbeiði II - Tónlist |
| **Endamál** | Studentarnir læra at arbeiða kritiskt við egnari tónlist og menna sjálvstøðugt tónasmíð. |
| **Innihald** | Skeiðið er framhald av Egið arbeiðið I - Tónlist. Eins og í fyrra skeiðinum verður arbeitt við egnum verkum, sum studentarnir tónseta í sambandi við skeiðið. Høvuðsdenturin verður lagdur á at neyvlurta, greina og kritiskt viðgera egið verk við atliti at, hvussu kompositión, formur og útseting samsvara við listaligu ætlanina hjá studentinum. Eisini verða viðkomandi ástøðiligir tekstir lisnir, ið seta arbeiðið hjá studentunum í størri listalig, heimspekilig og samfelagslig høpi. |
| **Læru- og undirvísingarhættir** | Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum meistaralæra (masterclass), har egna arbeiðið hjá studentunum verður viðgjørt og ment gjøgnum bólkarbeiði og í einsæris samrøðum. |
| **Próvtøkuháttur** | Avriksmappa verður latin inn við skeiðsenda. |
| **Læruúrtøka** | Tá skeiðið er lokið, skal studenturin vera førur fyri at<br>- greiða frá egnari arbeiðsgongd<br>- greina egnan tónasmíð við atliti at stíli, formi og tónleikagrein<br>- meta um listaligar styrkir og veikleikar í egnum verkum<br>- sýna dømi um menning av egnum arbeiði í tónlist (framleiða avriksmappu). |
| **Fortreytir** | Treyt fyri luttøku er, at studenturin er innskrivað/ur til diplomútbúgvingina í listaligum arbeiði. |
| **Lestrarlisti** | Viðkomandi tilfar verður útflýggjað við lestrarbyrjan. Til próvtøkuna gevur studenturin upp tað tilfar, sum er lisið/lurtað eftir á skeiðinum umframt egið tilfar. Tilfarið skal í vavi samsvara við tær ásetingar, sum eru fyri skeið á BA-stigi á Føroyamálsdeildini. |
| **Próvdøming** | Uttanhýsis próvdøming. |
| **Próvtalastigi** | 7-talsstigin. |
| **Stig** | BA |
| **Undirvísari** | Lasse Thorning Jæger og Sunleif Rasmussen |
| **Ábyrgd** | Sunleif Rasmussen |

## Verkstova II – Tónlist

**Skeiðsnummar** 1645.20 **ECTS** 10

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Verkstova II – Tónlist |
| **Endamál** | Studentarnir fáa grundleggjandi innlit í tónleikaframleiðslu og læra at brúka viðkomandi tónleikatøkni í egnum tónlistaligum arbeiði. |
| **Innihald** | Verkstovan fer í stóran mun at snúgva seg um, hvussu tónleikatøkni verður nýtt í skapandi tónasmíð og sum amboð at framleiða liðug tónleikaverk. Undirvísingin verður løgd til rættis, so innihaldið í mest møguligan mun samsvarar við verkliga tørvin hjá studentunum. Arbeitt verður eitt nú við at greina og brúka ymsar tónleikaformar. Undirvíst verður í at brúka viðkomandi forrit og tøkni, og studentarnir læra at arbeiða við egnum tónleikaverkum frá upptøku til lidna framleiðslu. Eisini verður hugt eftir mótsetninginum millum elektroniskan og ikki-elektroniskan tónleik og listaligu møguleikunum, ið finnast í hesum mótsetningi. |
| **Læru- og undirvísingarhættir** | Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum verkstovuundirvísing við venjingum, fyrilestrum og framløgum. |
| **Próvtøkuháttur** | Samansett próvtøka. Munnlig próvtøka við støði í avriksmappu, ið verður latin inn tvær vikur áðrenn próvtøkuna. |
| **Læruúrtøka** | Tá skeiðið er lokið, skal studenturin vera førur fyri at<br>- greiða frá ástøðiligum hugsanum og arbeiðshættum í tónasmíð og tónleikaframleiðslu<br>- greinandi og kritiskt viðgera hesi<br>- sýna dømi um menning av egnum arbeiðshættum í tónasmíð við serligum atliti at tónleikaformum og tónleikaframleiðslu (gera avriksmappu). |
| **Fortreytir** | Treyt fyri luttøku er, at studenturin er innskrivað/ur til diplomútbúgvingina í listaligum arbeiði. |
| **Lestrarlisti** | Viðkomandi tilfar verður útflýggjað við lestrarbyrjan. Til próvtøkuna gevur studenturin upp tað tilfar, sum er viðgjørt á skeiðinum umframt egið tilfar. Tilfarið skal í vavi samsvara við tær ásetingar, sum eru fyri skeið á BA-stigi á Føroyamálsdeildini. |
| **Próvdøming** | Uttanhýsis próvdøming. |
| **Próvtalastigi** | 7-talsstigin. |
| **Stig** | BA |
| **Undirvísari** | Jens Ladekarl Thomsen og Sunleif Rasmussen |
| **Ábyrgd** | Sunleif Rasmussen |

# Reglur fyri námið

## Lestrarlistar

Í lestrarevnum, ið telja 10 ECTS, verða uppgivnar uml. 500 síður.

Tó kann býtið millum tey fýra tilfarssløgini, alment ástøði, serbókmentir/sertilfar, grundtekstir og egnir tekstir/løg/tónleikur, skifta frá einum lestrarevni til annað. Í summum kann meginparturin vera innan ástøði, háttalag og viðgerð av ávísum evnum; í øðrum kann høvuðsdentur liggja á egnari framleiðslu. Krøvini verða ásett í hvørjum føri.

Lestrarevni av aðrari støðd verða roknað samsvarandi hesum.

## Endalig verkætlan

Útbúgvingin endar við endaligari verkætlan, sum telur 20 ECTS. Úrslitið av verkætlanini er eitt egið ritlista- ella tónlistaverk, sum í vavi og dygd er nóg haldgott til at verða góðkent sum fráfaringarverk. Verkætlanin verður løgd til rættis í samráð við leiðbeinara, ið eisini leiðbeinir arbeiðið, meðan verkætlanin fer fram. Saman við ritgerðini er endaliga verkætlanin ætlað sum partur av eini avriksmappu, ið skjalprógvar førleikan hjá studentinum bæði at útinna listaligt arbeiði á høgum støði og at hugsa greinandi um list og egna skapanargongd.

## Ritgerð

Partur av endaligu verkætlanini er ein ritgerð, sum verður latin inn fyri seg, telur 10 ECTS og er 15-20 síður til longdar. Ritgerðin skal skrivast sum ein ritroynd við ástøðiligari frásjón, har studenturin fær høvi at hugleiða um arbeiðsgongdina við endaligu verkætlanini og verkið, sum spyrst burturúr. Ritgerðin eigur at prógva evnini hjá studentinum at greina og nýta vísindaligt ástøði og háttalag. Studenturin velur evnið í samráð við leiðbeinara, og útbúgvingarleiðarin skal góðkenna, og dekanurin skal staðfesta evnið.

## Innlating av endaligari verkætlan og ritgerð og møguligar seinkingar

Endaliga verkætlanin og ritgerðin verða gjørdar í 4. lestrarhálvu og latnar inn við endan á hálvuni. Um studenturin ikki letur verkætlanina og ritgerðina inn til tíðina, kunnu heitini snarast, og studenturin fær 2 mánaðir afturat til verkætlanina og ritgerðina. Um hann heldur ikki letur inn tá, kunnu heitini snarast eina ferð afturat, og studenturin fær 2 mánaðir afturat. Um hann heldur ikki letur inn tá, hevur hann brúkt allar tríggjar møguleikarnar. Um seinkingar so sum barnsburðarfarloyvi og sjúka eru í lestrinum, er evsta mark at lata endaligu verkætlanina og ritgerðina inn 1 ár eftir seinasta próvtøkudagin. Serlig avtala má tá gerast við útbúgvingarleiðaran. Um studenturin ikki letur inn tá, kann hann søkja um loyvi at lata inn seinni. Hann kann søkja um loyvi at viðgera sama evni, sum hann

møguliga hevur fingið staðfest. Um nevndu mannagongdir og freistir ikki verða hildnar, verður studenturin útskrivaður uttan endaligt prógv.

## Allýsing av lestrarevnum

Eitt lestrarevni, sum er 10 ECTS, svarar til undirvísing í umleið 45 tímar.

Lestrarevnini eru verklig, ástøðilig ella samansett. Tilfarið, ið lesast skal í einum lestrarevni, er vanliga av fýra sløgum:

- alment ástøði og háttaløg
- serbókmentir/sertilfar
- grundtekstir
- egnir tekstir/løg/tónleikur

Í tí fyrsta bólkinum eru fyrst og fremst samanhangandi verk um ástøði og háttalag, men greinir og greinasøvn koma eisini upp á tal. Annar bólkurin er eitt úrval av serbókmentum við greiningum, viðgerðum o.tíl., eitt nú greinir og partar av størri verkum. Nøgd og slag kann skifta eftir lestrarevni, serliga tá ið tað ræður um tann seinasta bólkin, grundtekstir. Grundtekstir í ritlistaligum lestrarevnum eru yrkingar, stuttsøgur, skaldsøgur, týðingar, ástøðilig ella søgulig verk o.a., alt eftir hvat lestrarevni tað snýr seg um; grundtekstir í tónlistaligum lestrarevnum eru nótabløð, tónleikaútgávur o.a.

## Góðskrivingar av lestri uttanlands og á øðrum deildum á Fróðskaparsetrinum

Treytin fyri at studentur tekur part/ar av náminum uttanlands og/ella á øðrum deildum Setursins er, at studenturin leggur lesturin til rættis og ger avtalu um hann við ta universitetsdeild, hann ætlar at vitja. Ætlanin skal leggjast fyri Føroyamálsdeildina frammanundan til fyribils góðkenningar fyri at tryggja, at tað ber til at góðskriva lesturin.

Studentar, ið koma við prógvi frá øðrum lærustovni ella øðrum deildum á Setrinum, og sum ynskja at fáa lærugreinir góðskrivaðar, skulu søkja fyri 1. oktober/1. mars.

## Lokin skeið eftir eldri námsskipanum

Skeið, ið eru lokin á deildini eftir eldri námsskipanum, kunnu góðskrivast/flytast til galdandi lestur eftir umbøn. Avtala skal gerast um tað við útbúgvingarleiðaran.

## ECTS (European Credit Transfer System)

ECTS er ein roknieind fyri støddina og arbeiðsbyrðuna á náminum. Eitt námsár (fulltíðarnám) svarar til 60 ECTS, og lærugreinir, lestrarevni og ritgerðir fáa tillutað so mong ECTS, sum námsbyrðan svarar til í fulltíðarnámi. Eitt ECTS svarar til 25-30 arbeiðstímar.

## Mentorskipan á Ritlistaleiðini

Mentorskipanin hevur til endamáls at stuðla, menna og styrkja studentin í arbeiðinum við egnari ritlist. Studenturin fær ein mentor eftir egnum vali, og í samráð leggja mentorur og studentur leistin fyri samstarvið. Mentorskipanin gevur studentinum møguleika fyri minst trimum samrøðum á 2 tímar við mentorin uttan fyri vanligu undirvísingina í eina lestrarhálvu (februar - mai). Í samráði við studentin ger mentorurin eina ætlan fyri lestrarhálvuna, og samrøðurnar býtast javnt yvir lestrarhálvuna.

## Skeið á útbúgvingini í Føroyskum

Studentar á Ritlist kunnu velja skeið, sum verða boðin út á útbúgvingini í Føroyskum, tó í mesta lagi svarandi til 10 ECTS av allari Útbúgvingini í listaligum arbeiði. Í slíkum førum skal umsókn sendast til útbúgvingarleiðaran, sum avgreiðir og góðkennir valið.

## Serskeið á Tónlistaleiðini

Studentar á Tónlistaleiðini kunnu gera avtalu um stutt serskeið í t.d. sangi ella ljóðførislæru. Lærarar á Tónlistaleiðini gera saman útbúgvingarleiðarunum av, um og hvussu skeiðini verða skipað.

## Sjálvlestrarlistar

Í aðru og triðju lestrarhálvu lata studentarnir inn ein lista við 5 verkum til egnan lestur. Á tónlistaleiðini kunnu tað vera verk um tónleik ella/og tónleikaverk. Sjálvlestrarlistarnar leggjast afturat tilfarinum, sum vísast kann til undir prógvhoyringini í verkstovu og egnum arbeiði.

## Innskriving

Tá studentur er upptikin á deildina, verður hann biðin um at útfylla innskrivingarblað til lestur og próvtøku. Innskrivingarblaðið er bara galdandi fyri eitt lestrarár. Tað merkir, at studenturin skal endurnýggja innskrivingina á hvørjum ári (fyri 20. august). Til stakskeið er studenturin innskrivaður ta hálvu, skeiðið verður lisið. Innskriving til próvtøku er sjálvvirkin. Tó skulu tey, ið hava víðkað lestrarevni, og tey, sum taka sjálvlestrarevni, skriva seg inn til próvtøku innan freistirnar 1. oktober/1. mars. Tað ber ikki til at taka seg aftur frá próvtøku, og studenturin má bíða til næstu regluligu próvtøkur eru, um hann ikki fer til próvtøku, tá regluliga próvtøkan verður hildin – sí tó ásetingar um sjúku.

## At skifta leið

Studentur, sum vil skifta leið, skal senda umsókn til útbúgvingarleiðaran saman við dømi um egið listaligt avrik. Útbúgvingarleiðarin sendir viðkomandi lærarum á leiðini, sum studenturin vil skifta til, listaliga avrikið, og ráðførir seg við teir, áðrenn avgerð verður tikin. Dekanurin staðfestir avgerðina. Tað ber einans til at skifta leið fyrstu hálvuna í lestrinum.

# Próvtøkur

## Almenn próvtøkukrøv

Próvtøka er í hvørji lærugrein sær. "Staðið" ella "2" eftir 7-talsstiganum krevst fyri at standa hana. Summar próvtøkur eru skipaðar sum "uttanhýsispróvtøkur", og tá verður avrikið dømt saman við próvdómara frá øðrum lærustovni, og próvtal verður givið. Aðrar próvtøkur eru skipaðar sum "innanhýsispróvtøkur", og tá dømir lærarin í lærugreinini saman við øðrum lærara/lærarum á deildini ella Fróðskaparsetrinum avrikið sum "staðið" ella "ikki staðið".

Í summum førum ber til at sleppa undan próvtøku, um studenturin møtir til 80% av tímunum í lærugreinini og er virkin í tímunum - sí í slíkum førum lýsing av lærugreinunum.

Við próvtøku skal studenturin prógva, at hann hevur ognað sær nøktandi fakligt innlit í tær einstøku lærugreinirnar. Próvtøkumálið er føroyskt. Tó kann próvtøkumálið vera annað norðurlendskt mál, um lærarin ella próvdómarin ikki skilur føroyskt. Fyri skiftisstudentar eru aðrar reglur galdandi.

Tá ið skrivligar uppgávur verða dømdar, vigar fakligt innihald mest.

## Lestrarlistar

Tilskilað er við tær einstøku lærugreinirnar, um lestrarlisti skal latast inn. Tá lestrarlisti skal latast inn, skal studenturin í seinasta lagi ein mánað fyri próvtøkudag (til bundna heimauppgávu: ein mánað áðrenn evnið verður útflýggjað) lata læraranum lestrarlista til góðkenningar. Á lestrarlistanum skulu standa uppgivin verk, tekstir og blaðsíðutal. Leiðbeining viðvíkjandi lestrarlista fæst vanliga í sambandi við undirvísingina. Um studenturin skrivar fría heimauppgávu, verður lestrarlisti ikki latin inn.

## Verk, tekstir og blaðsíður

Í lestrarlistunum eru krøv sett viðvíkjandi verkum, tekstum og blaðsíðum.

Eitt **verk** er ein heild, t.d. eitt yrkingasavn, stuttsøgusavn, ritroyndar-/essay-savn, skaldsøga, leikrit, sjónvarps- og útvarpssending. Tað kann eisini vera eitt tekstasavn ella savn við ljóðupptøkum/tónleiki, sum studenturin sjálvur setur saman, og sum í minsta lagi er 100 síður til støddar (ella samsvarandi tilfar við bæði teksti og ljóðupptøkum).

**Stuttir tekstir** eru stakar yrkingar, stuttsøgur, ritroyndir/essay, greinir, hugleiðingar, kvæðir, løg og vísur. **Tekstir** eru eisini brøv, samrøður, lýsingar, myndir, upptøkur o.tíl.

Eitt **vísindaligt verk** er ein vísindalig ritgerð, 80-100 síður ella meira. Studenturin kann sjálvur seta eitt vísindaligt verk saman av greinum og stuttum ritgerðum. Tað skal í minsta lagi vera 100 síður til støddar. Roknað verður við **miðalblaðsíðum**, sum eru um 2.400 eindir hvør.

## Heimauppgávur

Til summar próvtøkur – serliga í ástøðiligu skeiðunum – skal studenturin skriva eina heimauppgávu, sum hevur samband við undirvísingina í staðin fyri at fara til skrivliga ella munnliga próvtøku. Tvey sløg av heimauppgávum eru: uppgáva við uppgivnum evni (bundin heimauppgáva) ella uppgáva við sjálvvaldum evni (frí heimauppgáva).

*Frí heimauppgáva*: Tá er próvtøkan heimauppgáva um eitt sjálvvalt evni. Treytin fyri at studenturin sleppur at skriva fría heimauppgávu er, at hann virkin hevur fylgt undirvísingini; eitt nú skal hann í minsta lagi hava verið í 80% av tímunum. Lærarin skal góðkenna evnið til ta fríu heimauppgávuna, og uppgávan skal vera innlatin ásettan dag.

*Bundin heimauppgáva*: Til uppgávu um eitt uppgivið evni orðar lærarin spurningin, og alt eftir hvørjum stigi teir lesa á, er vegleiðandi longdin á uppgávunum hendan:
Heimauppgáva, sum telur 10 ECTS, skal vera uml. 10-15 síður á BA-stigi.

Roknað verður við miðalsíðum við uml. 2.400 eindum (bókstøvum, teknum og millumrúmum íroknaðum), tað er t.d. Times New Roman 12 pkt., breddin vinstru- og høgrumegin 3 cm, í erva og í neðra 2,5 cm, hálvtannað regluglopp. Við í síðutalið telja uppgávutekstur og notur, ikki perma, innihaldsyvirlit, bókmentalisti og fylgiskjøl.
Aftast í heimauppgávunum skal vera bókmentalisti.

*Samansett próvtøka á BA-stigi*: Uppgáva við ásettum dagatali, sum skal vera millum 4 og 6 síður til longdar.

## Bólka- og einstaklingsuppgávur

Tað ber til at skriva heimauppgávur einsamallur/einsamøll ella í bólki. Í mesta lagi tríggir studentar kunnu skriva uppgávu saman. Til støddar skulu uppgávur skrivaðar í bólki vera so mangar ferðir fleiri blaðsíður enn einstaklingsuppgávurnar, sum studentar eru í bólkinum. Studentarnir skulu skila til, hvat hvør hevur skrivað og hevur ábyrgdina av í uppgávuni og lata uppgávuna døma eftir tí, soleiðis at hvør studentur fær sítt próvtal.

## Rættlæti

Í ástøðiligu skeiðunum má studenturin fylgja reglunum um vísindaligt rættlæti. Tað er óreiðiligt ikki at geva upp heimildir, so at villleiðing stendst av viðvíkjandi avriki hjá viðkomandi studenti. Avskrift og eftirgerð av tekstum hjá øðrum er falsan, um ikki greitt verður tilskilað, hvat er sitat, hvat er endursøgn av teksti hjá øðrum, og hvaðani hugmyndir, sum ikki eru almennar og ikki eru studentsins, eru fingnar. Dømi, sum heilt greitt eru svik, er at lata uppgávu inn, sum studenturin ikki sjálvur hevur skrivað ella at lata somu uppgávu inn til fleiri próvtøkur.

## Egið avrik

Í skeiðunum Egið arbeiði og Verkstova kunnu egin listalig avrik hjá studentinum vera partur av próvtøkutilfarinum, og hesi verða tá mótroknað talinum av uppgivnum síðum.

# Próvtøkuhættir

Í hvørji lærugrein sær verður ásett, hvørjir próvtøkuformar galda. Sí einstøku skeiðslýsingarnar.

## Munnlig og skrivlig próvtøka

*Galdandi fyri lestrarevni, ið telja 10 ECTS:*

1. Munnlig próvtøka í 30 minuttir (við 30 minuttum í fyrireikingartíð)
2. Skrivlig próvtøka í 6 tímar
3. Samansett. Sjálvvalt egið avrik + munnlig framløga
4. Samansett. Bundin heimauppgáva + munnlig framløga
5. Samansett. Ávíst dagatal, 1-3 dagar, at fyrireika framløgu til hálvtíma munnliga próvtøku um uppgivið evni

## Heimauppgávur

1. Heimauppgáva (tvær vikur) um eitt uppgivið evni
2. Heimauppgáva (ein vika). Fyrireiking til munnliga framløgu um uppgivið evni
3. Heimauppgáva um sjálvvalt evni, ið hevur samband við undirvísingina. Lærarin skal góðkenna evnið. Treytin fyri at skriva fría heimauppgávu er, at studenturin hevur verið virkin í undirvísingini Um støðd: sí Heimauppgávur.

## Avriksmappa

Avriksmappan endurspeglar eina arbeiðsgongd, og próvtøkan tekur sostatt støði í tí arbeiði, sum studenturin hevur avrikað í eina undirvísingarhálvu.

1. Avriksmappa verður latin inn við skeiðsenda
2. Samansett próvtøka. Munnlig próvtøka við støði í avriksmappu, ið verður latin inn tvær vikur áðrenn próvtøkuna

Í hvørjum skeiðið sær verður ásett, hvørjir próvtøkuformar galda. Lærari kann eisini søkja um at royna nýggjar próvtøkuhættir, sum ikki eru lýstir í námsskipanini. Í slíkum førum skal lærarin, áðrenn skeiðið verður lýst, leggja eina skrivliga umsókn við grundgevingum fyri útbúgvingarleiðaran. Avgerðin hjá útbúgvingarleiðaranum skal síðani staðfestast í Lestrarráðnum. Eftir skeiðslok og próvtøku skal lærarin senda Lestrarráðnum eina eftirmeting.

# Próvreglur

## Próvtøka

Øll skeið enda við próvtøku. Studentur, sum ikki møtir, er fallin. Tey, sum ætla sær til próvtøku í lærugreinunum í listaligum arbeiði, skulu:

- vera innskrivað á Fróðskaparsetrinum til nám í listaligum arbeiði á Føroyamálsdeildini
- hava møtt regluliga til undirvísing
- lata inn góðkendan lestrarlista til ásetta tíð, t.e. 1 mánað fyri próvtøkudag (til bundna heimauppgávu 1 mánað fyri dagin, tá ið evnið verður útflýggjað), um so er, at hann er kravdur – sí lestrarlistar
- til munnliga og skrivliga próvtøku: møta rættstundis próvtøkudagin, t.e. **í seinasta lagi 15 minuttir** fyri próvtøkubyrjan
- til bundna heimauppgávu: kvitta fyri móttøku av uppgávuevni og lata svarið innaftur ásetta tíð
- til fría heimauppgávu: lata inn uppgávu í seinasta lagi ásettan dag og tíð.

Bundnar og fríar heimauppgávur skulu latast inn talgilt. Tá innlatið er, uttan at freistin er farin, ber ikki til at lata inn av nýggjum (við broytingum/rættingum).

Ritgerðir skulu latast inn talgilt umframt í trimum pappírsútgávum. Tað sama er galdandi fyri endaligar verkætlanir í ritlist og nótabløð til endaligar verkætlanir í tónlist. Upptøkur av endaligum verkætlanum í tónlist skulu latast inn talgilt.

Tá studentar skulu gera endaliga verkætlan og ritgerð, skulu teir avtala eitt evni við ein leiðbeinara, og útbúgvingarleiðarin skal góðkenna, og dekanurin skal staðfesta evnið.

## Endurpróvtøka

Studentur kann í mesta lagi fara tríggjar ferðir til somu próvtøku. Útbúgvingarleiðarin kann tó eftir skrivligari umsókn loyva studentinum at fara til próvtøku í sama faki fjórðu ferð, um serligar umstøður tala fyri tí. Umsókn um undantaksloyvi skal vera latin deildini í seinasta lagi 2 vikur, eftir at studenturin hevur fingið boðini um, at hann er fallin triðju ferð.

Studenturin kann ikki krevja at sleppa til endurpróvtøku, um hann ikki fer til próvtøku, tá regluliga próvtøkan verður hildin, tó er sjúka undantak.

## Sjúka

Um sjúka forðar studenti í at fara til próvtøku skal hann **í seinasta lagi, tá próvtøkan byrjar**, boða deildini frá, at hann er sjúkur. **Harumframt** skal hann lata deildini **sjúkuváttan**:

a. við munnliga og skrivliga próvtøku: í seinasta lagi 8 dagar seinni
b. við bundna heimauppgávu: í seinasta lagi 8 dagar seinni
c. við fría heimauppgávu: í seinasta lagi innlatingardagin

# Próvtøkuhald

## Møting

Skrivlig próvtøka byrjar vanliga kl. 9.00.

Studentarnir eiga at koma í seinasta lagi 15 minuttir frammanundan, men best er at koma í góðari tíð, serliga um telda skal setast upp.

Støða verður í hvørjum einstøkum føri tikin til, um ein studentur, ið møtir eftir at próvtøkan er byrjað, kann sleppa inn. Er nakar av teimum, ið eru til próvtøku, farin út úr próvtøkuhølinum, aftan á at uppgávurnar eru útflýggjaðar, er ikki møguligt at koma inn, uttan so at hin útfarni hevur verið undir støðugum eftirliti. Heldur ikki kann tann, ið kemur seinni enn 1 tíma eftir byrjan, sleppur inn. Tann, ið kemur ov seint, fær ikki lagt afturat tíðini fyri tað, sum mist er.

## Hjálparamboð

Í skeiðslýsingunum fyri hvørt skeið sær verður vanliga sagt frá, hvørji hjálparamboð loyvt er at hava við sær til próvtøkuna, og kunngerð um tað skal eisini vera sligin upp uttan fyri próvtøkuhølini. Studentarnir mugu sjálvir kunna seg um hesi viðurskifti og hava við sær loyvdu amboðini. Loyvt er ikki við próvtøkuna at læna frá øðrum enn próvtøkueftirlitinum.

Studentarnir hava skyldu til at lata frá sær til próvtøkueftirlitið øll amboð o.tíl., ið ikki eru loyvd og sum tey hava við sær inn í próvtøkuhølini, íroknað fartelefonir. Annars kunnu teir verða burturvístir.

## Sjúka við próvtøkuhaldið

Um ein gerst sjúkur við próvtøkuna, kann verða boðað frá til eftirlitið, ið kann fylgja viðkomandi útum eitt stutt bil.

Verður hin sjúki noyddur at gevast við próvtøkuni, skal uppgávan við avrikum latast inn og kann fáa átekning eftirlitsins um, at viðkomandi er givin fyri sjúku. Vil hin sjúki sleppa til sjúkraprótøku, skal læknaváttan verða latin deildini í seinasta lagi 8 dagar eftir próvtøkudagin.

## Um at fara frá próvtøku

Fer ein úr próvtøkuhølinum av eini av hesum orsøkum:

a) studenturin vil ikki svara uppgávuni
b) studenturin er liðugur at svara uppgávuni, áðrenn tíðin er farin
c) aðrar próvtøkur fara fram samstundis í sama høli, ið vara longri enn eins egna

má hann fara úr hølinum uttan at órógva.

Samleikateigarnir á svartilfarinum skulu vera fyltir út, áðrenn ein fer úr hølinum, og um studenturin hevur skrivað á teldu, skal hann undirskriva seinasta arkið.

Studenturin kann bara sleppa úr hølinum tann fyrsta tíman, um allir studentarnir eru møttir. Eingin studentur má fara frá borðinum uttan at boða eftirlitinum frá og lata frá sær uppgávusvørini - ella í minsta lagi umslagið við teigunum útfyltum.

## Próvtøkutíðin lokin

Tá svartíðin er farin, savnar próvtøkueftirlitið uppgávusvørini, og studentarnir eiga at steðga á, til alt tilfarið er innlatið. Er nakar farin út úr hølinum við uppgávusvørunum, verður tilfarið ikki próvdømt, men hetta telur kortini sum ein próvtøka.

## Próvtøkuúrslit

Úrslitið av próvtøkuni verður vanliga kunngjørt beint eftir lidna próvdøming. Aðalreglan er, at próvtøkur skulu vera próvdømdar innan ein mánað. Undantiknar hesi reglu er endaliga verkætlanin, sum skal vera próvdømd innan tveir mánaðir.

## Viðvíkjandi kærum

Víst verður til galdandi kunngerð (sí heimasíðu Setursins).

# Reglur um teldunýtslu til próvtøku

Umframt vanligu próvreglurnar eru hesar reglur galdandi fyri teldunýtslu til próvtøku:

1) Studentarnir skulu sjálvir hava teldu við, meðan Setrið syrgir fyri útprentingini
2) Um loyvt er at brúka orðabøkur til próvtøkuna, fæst atgongd til orðabøkur Sprotans á *uni_exam*. Studentarnir fáa loyniorð til *uni_exam* frá próvtøkueftirlitinum, beint áðrenn próvtøkan byrjar. **Burtursæð frá *uni_exam*, sum bara er loyvt til nakrar próvtøkur,er ikki loyvt at brúka Internetið yvirhøvur.**
3) Umframt serligu atgongdina til orðabøkur Sprotans kann studenturin bara vera á skjalinum, sum er lagt á útflýggjaða geyman, og um notur eru loyvdar, er eisini loyvt at fara inn á tær, men tær eiga at vera goymdar fyri seg í serligari mappu, soleiðis at próvtøkueftirlitið skal kunna hava eftirlit. *Um eingi hjálparamboð eru loyvd, skal studenturin bara vera á skjalinum á geymanum (sum hevur serligan lit).*
4) Studenturin fær útflýggjaðan geyma við skjali við arkhøvdi, sum bert kann verða nýtt í Word (ella Word-sambæriligum forriti) frá deildini, áðrenn próvtøkan byrjar, og mælt verður til at nýta skriftina Times New Roman, stødd 12 og hálvtannað regluglopp.
5) Tá studenturin er liðugur og ætlar at lata inn, skal geymin handast eftirlitsfólkinum, sum syrgir fyri, at tilfarið verður prentað út. Studenturin verður sitandi á sínum plássi til eftirlitsfólkið kemur aftur við útskrivaða uppgávusvarinum. Loyvt er at prenta út eitt royndarprent. Til ber vanliga bara at prenta út seinasta tíman av próvtøkutíðini. Tá próvtøkutíðin er farin, skal alt vera útprentað og lagt í próvtøkuumslagið.
6) Tað er studenturin sjálvur, sum velur tey ørk, ið skulu latast inn til døming. Øll útskrivað ørk skulu byrja við navninum á studentinum og hava dagfesting og síðunummar á. Undirskrift skal vera á seinasta arki. Geymin kann ikki nýtast sum kladda ella sum skjalprógv fyri, hvat møguliga skuldi verið latið inn.

7) Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av regluliga at goyma tekstin, meðan próvtøkan fer fram. At teksturin ikki er goymdur, gevur ikki grundarlag fyri at fara til endurpróvtøku.
8) Um streymslit er, meðan próvtøkan fer fram, ella aðrir trupulleikar taka seg upp, sum ikki beinleiðis kunnu vera bøttir í sambandi við at nýta telduútgerð, heldur próvtøkan fram, uttan at teldan verður nýtt. **Tí er tað eisini sera týdningarmikið, at teksturin javnan verður goymdur á geymanum.**
9) Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av, at telduútgerðin riggar. Eingin teldukønur verður til staðar at hjálpa. Um so er, at trupulleikar stinga seg upp í telduútgerðini hjá tí einstaka, verður ikki longt um próvtøkutíðina, ei heldur verður møguleiki fyri endurpróvtøku. Studenturin skrivar tí víðari við hond og kann annars til eina og hvørja tíð fara at skriva við hond heldur enn teldu.
10) Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av, at ognin er tryggjað móti stuldri ella herverki, meðan ognin stendur í próvtøkuhølinum.

- Studenturin skal møta í góðari tíð og skal, áðrenn próvtøkan byrjar, tryggja sær, at teldan virkar, sum hon skal. Hann skal eisini tryggja sær, at geymin virkar saman við telduni.
- Staðfestir studentur fyri próvtøkubyrjan, at teldan ikki virkar, ella tað er sannlíkt, at teldan ikki fer at virka gjøgnum alla próvtøkuna, t.d. tí at trupulleikar eru við ritbúnaði ella tí at streymkápilin er gloymdur, má studenturin skriva við hond.